# *Semingsstovnurin*

Tórshavn 14. mars 2024

**Semja millum**

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**2022 – 2025**

**Sáttmálaskeið og lønarhækkan**

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2022 til 30. september 2025.

- Tann 1. oktober 2022 hækka lønirnar 3,80%.
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 4,20%
- Tann 1. oktober 2024 hækka lønirnar 4,75%

**Broytingar í sáttmálanum**

*Vaktargjald.* Galdandi frá 1. oktober 2023
Í § 6 stk. 3 verður vaktargjaldið roknað av tímalønini á stig 7.

*Frítíðarløn av yvirtíðarløn.* Galdandi frá 1. apríl 2024

> "§ 9, stk. 2 Harumframt eiga starvsfólk rætt til serstakt frítíðargjald, sum er 12 % av útgoldnari yvirtíðarløn í undanfarna innvinningarári."

*Í § 15 um barnferð verður sett inn.* Galdandi frá 1. oktober 2024

> "Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.
>
> Hendan ásetingin fær gildi fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024."

*§16, stk 1 verður soljóðandi.* Galdandi frá 1. oktober 2024

> "Um starvsfólk, ið eru lønt eftir hesum sáttmála, doyr, meðan tað er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi/samlivandi ella børn undir 18 ár, sum tað hevði skyldu til at uppihalda, rætt til løn samsvarandi uppsagnartíðini, tó í minsta lagi 3 mánaðir og mesta lagi 6 mánaðir."

# *Semingsstovnurin*

*Viðv. skeið. Nýtt § 20, stk. 3.* Galdandi frá 1. apríl 2024

> "Samsýnt verður fyri ferðatíðina til skeiðsstaðið (uttanbíggja), um talan er um ferðing sjóvegis, ið varðar longri enn ein tíma. Samsýnt verður ikki, um ferðatíðin ikki er longri enn ferðatíðin vanliga er frá heimi til vanliga arbeiðsstaðin. Samsýnt verður í mesta lagi fyri 4 arbeiðstímar. Ferðing í bili verður roknað í skeiðstíðina."

**Dagføring**
Lønartalva og sáttmáli verða dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

**Protokollat**
Partarnir, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag eru samdir um, í sáttmálaskeiðnum, at endurskoða starvsbygnaðin í størru føroysku havnunum. Endamálið við endurskoðanini er meta um starvsheitini í mun til innihaldið í starvinum og tey krøv sum sett verða til førleikarnar.

Endurskoðanin skal verða framd 1. oktober 2024.

Tórshavn tann 14. mars 2024

| Føroya Skipara- og Navigatørfelag | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið |
|---|---|
| Annfinnur Garðalíð<br>formaður FSN | Per Martin Gregersen<br>formaður í KAF |
| | Anita Fuglø<br>leiðari KAF |